# Vilja ikki hava Miðvá



ALMENT OPIN

*Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, hevur júst klipt bandið, sum alment letur Klingruna upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**KLINGRAN – Vegurin hevur rundkoyring, gonguteigar, skelti, ljós, busslummar og gongutunnil. Haraftrat eru gongugøtur, sum knýta saman økið millum Flatarvegin og Klingruna, og ætlanin er at gera fleiri slíkar gongugøtur, segði Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, tá hon alment læt upp Klingruna**

Vilmund Jacobsen

Tórshavnar kommuna hevur nú alment latið upp vegin millum býlingin Inni á Gøtu og Løgmannabreyt. Hetta hendi við eitt hátíðarhald í góðveðrinum gjáramorgunin, tá umboð fyri býráðið, umboð fyri arbeiðstakarar og børn og starvsfólk úr býlingshúsinum Inni á Gøtu vóru hjástødd. Hesin vegur verður nú róptur Klingran.

Í sambandi við løtuna, plantaðu børn úr býlingshúsinum eisini trø á einum øki við vegin.

Tað var Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, sum helt røðu og klipti snórin, sum læt samanbindingina upp alment. Eftir upplatingina, varð bjóðað til kaffi, te og morgunbreyð í býlingshúsinum Inni á Gøtu.

### Fleiri atlit

Býráðslimurin og forkvinnan í teknisku nevnd geiddi í síni røðu frá søguni aftanfyri hesa og aðrar nýggjar vegagerðir í kommununi.

Hon segði, at tað var hin 14. juni í 2005, at tekniska nevnd tók nakrar prinsipiellar og týðandi avgerðir, sum hon tók til.

- Avgerðirnar vóru, at nú skuldu umhvørvi, ferðslutrygd, súklubreytir og atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum raðfestast og takast við í allar nýggjar kommunalar vegaætlanir. Henda avgerð varð seinni staðfest í býráðnum.

Marin Katrina Frýdal vísti á, at í politikki er ofta langt frá hugskoti til avgerðir – og síðan til avrik og úrslit.

- Men í dag gongur sjón fyri søgn. Við hesi vegagerð, Klingran og eisini við Glyvursvegin úti á Argjum, er Tórshavnar kommuna við til at skriva føroyska vegasøgu.

Hon segði, at hetta eru vegir, sum kommunan kann fegnast um og vera errin av.

- Her hevur tað estetiska havt hægstu raðfesting; her eru eingi gapandi sár latin eftir í náttúruni.

Forkvinnan í teknisku nevnd vísti á, at vegirnir eru ferðslutrygdargrannskoðaðir, soleiðis at teir eru ferðslutryggir, bæði fyri fólk og bilar.

### Reinsað vegavatn

Marin Katrina Frýdal vísti á, at trupulleikarnir við yvirflatuvatni á vegunum eru vorðnir størri og størri so hvørt, sum býurin er vaksin, og ferðslan er økt.

Hon vísti eisini á, at nýtslan av píkum slítir vegirnar nógv um veturin, og ein stórur partur av hesum dálkaða vegavatni endar úti í áunum. Saltingin av vegunum um vetrarnar endar eisini í áunum.

- Tá turt er í veðrinum, endar hetta skitnað dustið í lungum okkara.

Forkvinnan í teknisku nevnd segði, at við áðurnevndu samtykt, sum býráðið seinni staðfesti, verður vegavatn nú reinsað við reinsibrunnum, soleiðis at tað er reint vatn, sum verður latið út aftur í áir, løkir og vøtn.

- Her verður eisini plantað fram við vegnum, og ætlanin er at halda fram við at planta, eins og sama ætlan verður framd við Glyvursvegin.

Hon segði, at umframt at vera ljóðvernd, eru plantурnar eisini við til at fanga dustið av vegnum góðveðursdagar.

- Eisini eru ljóðvollar gjørdir fyri at verja nærumhvørvið móti billarmi og osi, legði hon aftrat.

Marin Katrina Frýdal segði, at Klingran hevur rundkoyring, gonguteigar, skelti, ljós, busslummar, eins og gongutunnil er bygdur, so teimum gangandi ikki nýtist at fara tvørtur um vegin.

- Vegurin hevur eisini tey bláu busskeltini til Bygdaleiðir, segði hon.

Haraftrat eru gongugøtur bygdar, sum knýta saman økið millum Flatarvegin og Klingruna, og ætlanin er at gera fleiri slíkar gongugøtur.

### Skjótt og trygt

Marin Katrina Frýdal vísti í síni røðu á, at eitt ávíst kjak í seinastuni hevur verið millum Landsverk og